gult6 cyan6 magenta6 svart6

Hvítusunnumøtir við Heimsevangelistinum

ARIL E VARDSEN

[illegible]ttarmøtum á Hálsi

Fr[illegible]gjakvøldið	kl. 19.00	møti
Leygardagin	kl. 10.00	semin[illegible]
	kl. [illegible].00	møti [illegible]
	kl. 22.[illegible]0	lovsongsk[illegible]nsert
1. hv[illegible]	kl. 11.00	møti
	kl. 18.[illegible]0	møti
2. hvítusunnudag	kl. 11.00	[illegible]
	[illegible]l. 18.00	

Lovsangsbólkar úr Betania [illegible]lii-
húsinum, Kelduni, Rhema og [illegible]a sær
[illegible] lovsonginum.

[illegible]gið til merkis:
[illegible]amøti verða í B-36[illegible]t kvøld meðan
[illegible]ldmøtini eru.

[illegible]

Døgurði kr. 50- og nátturði kr. 40,- kann bíleggjast á tlf. 314828 í seinasta lagi sunnudagin 27. mai.

AR[illegible] stovnarin
av „[illegible]
Verde[illegible]“,
sum [illegible] 1200
innfø[illegible]
ymsas[illegible]
Brævsku[illegible]
lívið“ hevu[illegible]
londum og hi[illegible]
menniskju fullfø[illegible]
brævskeiðið.

Blaðið „Troens Bevis“ su[illegible]
mong her í Før oyum kenna,
verður pr entað í 9.000 eintøkum
hvørja ferð.

Og ikki at gloyma satelitt-
sendingarnar , hvørja viku til
Norður-afrika, Miðeystur og
Evr opa.

Kom og hoyr meira um
heimsevangeliseringina.

Tórbjørn Jacobsen:

Tímatalið í skúlunum er valstríð

Tað stendur ikki verri til við tímatalinum í skúlunum komandi ár, enn árini frammanundan. At Vestmanna skúli ger vart við, at tey ikki fáa tímatalvuna at hanga saman, er einki annað enn valstríð fyri Javnaðaðarflokkin saman við Sosialinum, staðfestir landsstýrismaðurin við ábyrgdini fyri fólkaskúlan

FÓLKASKÚLIN
John Johannessen

– Eg skilji ikki, hví dreingirnir í Vestmanna skulu sita og binda grýtulappar í staðin fyri at læra føroyskt.

Hetta er viðmerkingin frá Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni í skúla- og mentamálum, til, at Vestmanna skúli ikki fær tímatalvuna at ganga upp.

Vestmanna skúli boðaði á tíðindafundi mikudagin frá, at játtanin til tímar í ár er so lítil, at skúlin ikki fær tímatalvuna at hanga saman. Tí hevur leiðslan valt at skarva ein tíma í føroyskum, ein í donskum, ein í rokning og ein í kristini frá hvørjum flokki, fyri at fáa tímatalvuna at hanga saman innan fyri játtaða karmin.

Tað er í stríð við lógina at skarva soleiðis av tímatalvuni. Men leiðslan í Vestmanna skúla ger vart við, at hetta hevur hon verið noydd at gera í fleiri ár. Munurin er bert tann, at áður hevur verið skarvað av handverk og list, men nú hava tey valt at skarva av føroyskum og øðrum líknandi lærugreinum, fyri at fáa myndugleikarnar at vakna og síggja í eyguni, at ov fáir tímar verða játtaðir til fólkaskúlan.

Nóg nógvir tímar

Tórbjørn Jacobsen heldur ikki, at trupulleikin við

Sambært landsstýrismanninum við ábyrgdini fyri fólkaskúlanum eru Sosialurin og Vestmanna skúli farin undir eina herferð fyri Javnaðarflokkin, tá tey gera vart við vantandi tímatal í fólkaskúlanumg

játtanini til skúlarnar er so stórur, sum Vestmanna skúli ger hann.

– Vestmanna skúli hevur fingið 428 tímar tillutaðarar til komandi skúlaár. Hann hevur ein næming færri enn seinasta skúlaár, og tískil fær hann 5 tímar færri enn seinasta skúlaár. Men samstundis fær hann 5 tímar eyka játtaðar til serundirvísing. Sostatt fær Vestmanna skúli sama tímatal, sum í fjør, men við einum næmingi færri, ger Tórbjørn Jacobsen greitt.

Tórbjørn Jacobsen heldur tað vera undarligt, at Vestmanna skúli heldur tíðindafund um tímatalið, samstundis sum Mentamálastýrið situr og arbeiðir við málinum.

– Tað er skemtiligt, at tað júst skal vera Vestmanna skúli, ið ger vart við seg, tá tað var ein Vestmenningur, ið skaffaði meira pening til skúlan. Og hesin var Jógvan Djurhuus úr Tjóðveldisflokkinum, ikki Hans Pauli Strøm, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Tað reina valstríð

– At tað ikki hongur saman í Vestmanna skúla man bera boð um, at leiðslan ikki er nóg dugnalig til at fáa tað at hanga saman, og at politisk motiv liggja aftan fyri. Um tú hyggur at, hvør starvast í Vestmanna skúla, ber beinan vegin til at leggja tvey og tvey saman og finna út av, at politisk motiv liggja aftan fyri. Hetta er einki annað enn tað reina valstríð fyri Javnaðarflokkin, sigur landsstýrismaðurin við ábyrgdini fyri skúlanum.

Sosialurin skilir, at Tórbjørn Jacobsen sipar til, at Giðja Didriksen, sum er álitiskvinna í skúlanum í Vestmanna, er gift Hans Paula Strøm, ið situr á tingi fyri Javnaðarflokkin.

Men Tórbjørn Jacobsen steðgar kortini ikki her. Eftir hansara fatan er alt málið ein størri ætlan í einum valstríði fyri Javnaðarflokkin. Og hann skilur tað soleiðis, at Sosialurin er við í hesum valstríði. Tórbjørn Jacobsen heldur, at Sosialurin skrivaði um vantandi tímar til serundirvísing fyrr í vikuni, fyri at seta hol á valstríðið.

– Hetta er ikki annað enn tann reina propaganda hjá Sosialinum og Javnaðarflokkinum, staðfestir Tórbjørn Jacobsen.

Tórbjørn Jacobsen viðgongur kortini til endans, at fólkaskúlin sum heild hevur ov fáar tímar orsakað av ov lágari játtan

Suðuroyingar mugu »smugla« ferðafólk

Smyril er lagdur orsakað av verkfallinum. Tí eru ferðafólk noydd at ferðast við trolarum, skulu tey av oynni. Skipaetirlitið sigur, at tað er ólógligt at flyta nógv ferðafólk við fiskiskipum, men fer einki at gera við málið

VERKFALL
John Johannessen

Tveir trolarar og ein garnabátur fluttu sunnudagin ferðafólk millum Suðuroynna og Havnina.

Seinnapartin sunnudagin kom hvalbiartrolarin Steintór á Havnina við hópi av ferðafólki, klokkan ellivu sama kvøld kom Rankin av Tvøroyri á molan við góðum 30 ferðafólkum, og ein hálvan tíma seinni kom garnabáturin Anita av Tvøroyri fullfermdur við ferðafólki at bryggju undir Skipafelagnum.

Ólógligt

Skipararnir á øllum trimum skipunum høvdu tikið eyka bjargingarútgerð við umborð, so at nóg mikið bjargingarútgerð var umborð til manningina og øll ferðafólkini.

Men tað er kortini ólógligt soleiðis at flyta ferðafólk við fiskiskipum.

Sosialurin hevur spurt seg fyri hjá Skipaeftirlitinum, hvørjar reglur eru galdandi á hesum økinum. Og sambært Skipaeftirlitinum hevur einki skip, sum ikki er góðkent til ferðafólkaflutning, loyvi at flyta ferðafólk.

Tó ber til hjá einum fiskiskipi at taka fólk við frá til dømis Tvøroyri til Havnar, um onkur biður lova sær at sleppa við. Men skipið hevur tó ikki loyvi til at taka fleiri enn 12 fólk við. Harafturat hava fiskiskip ikki loyvi at gera nakað, sum ber brá av ferðafólkaflutningi. Hetta er galdandi líkamikið hvussu nógv bjarginarútgerð er umborð.

Skipini, sum komu av Tvøroyri sunnudagin, brutu sostatt lógina. Men hetta ætlar Skipaeftirlitið ikki at gera nakað við

Heim frá jarðarferð

Orsøkin til, at Antita fór til Havnar var, at ein rúgva av fólki frá meginøkinum, sum høvdu verið í Suðuoynni til jarðarferð, vóru stranda í Suðuroynni. Hesi vildu sleppa heim aftur, og skiparin á Antiu játtaði at flyta tey.

Við Rankanum kom ein skúlaflokkur, ið skuldi við Norrønu uttanlands á námsferð. Var flokkurin ikki sloppin til Havnar sunnudagin, slapp hann ikki námsferðina.

Eisini til Suðuroyar aftur vóru ferðafólk umborð á fiskiskipunum. Rankin loysti aftur beinan vegin, hann hevði fingið fólk umborð aftur. Men tá vóru ikki fleiri enn eini seks ferðafólk við, harímillum Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

Jóannes Eidesgaard segði seg ongar trupulleikar hava av, at hann fór suður við trolaranum. Hann vísti á, at forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt greitt, at felagið ikki ætlar sær at steðga fólkaflutningi og flutningi av mjólk.

FCK - Brøndby
í Íttrottarparkini 10. juni kl. 15.00

Úr Føroyum 7. juni kl. 20.40
aftur 11. juni kl. 09.00

Prísur: kr. 1.995,-
við atgongumerki og ferðaavgjaldi.
Avmarkað nógd.

North Atlantic Football Agency
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo